## Anfinn V. Hansen setti lív í

Anfinn V. Hansen er formaður í Reiðarafelagnum fyri Farmaskip, og á Shipping Føroyar 08 helt hann eina undirhaldandi – og tíðum skemtiliga – røðu. Hann var kortini ítøkiligur og vísti neyvt á, hvørjir vansarnir eru við FAS-skipanini, og hvørjir batar skulu gerast, um skipanin skal gerast kappingarfør við aðrar skipanir á økinum. Sosialurin fer at gera væl burtur úr framløguni hjá Anfinni í blaðnum í morgin, eins og vit fara at gera burtur úr øðrum framløgum á ráðstevnuni. Reiðarafelagið fyri Farmaskip var ein av stigtakarunum til ráðstevnuna, og lítið er at ivast í, at leikluturin hjá felagnum fer at hava sína ávirkan á, hvussu ein dagførd skipan fer at verða snikkað saman. (-vilmund)



# rføra skipan





*Løgmaður heilsar luttakarum og fyriskiparum, og í blaðnum í morgin fara vit at venda aftur til ymiskt av tí, sum var frammi á shipping-ráðstevnuni*

Løgmaður gav eisini sítt lyfti um, at FAS-skipanin verður endurskipað, so hon verður kappingarfør og kann stuðla uppundir búskaparligum vøkstri í samfelagnum.

- Eg vóni, at henda ráðstevna fer at geva okkum øllum størri áræði og virkishug enn higartil, segði Jóannes Eidesgaard, tá ið hann setti Shipping Føroyar 2008.





*Prosper er eitt av skipunum, sum Tor Shipping umsitir fyri norðmenn. Gongst, sum fyrireikararnir av Shipping Føroyar 2008 miðja eftir, verða 500 skip í FAS í 2015*

# 500 skip í FAS

**Miðjað verður eftir, at Føroyar í 2015 hava eina shipping-vinnu, sum í dagsins peningi hevur eina valutainntjening til føroyska samfelagið, ið svarar til eina miljard krónur**

SHIPPING 08
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað vóru Føroya Banki, Sjóvinnudepilin og Reiðarafelagið fyri Farmaskip, sum stóðu aftanfyri Shipping Føroyar 2008. Aftrat sær sum sponsorar, høvdu fyrireikararnir Team Beredskab, Supply Service, Thor og Mærsk.

Uppundir endan av ráðstevnuni, sum vardi allan fríggjadagin, segði Ragnar S. Olsen vegna fyrireikararnar, at ein maritimur fylgibólkur nú verður skipaður, sum skal fylgja arbeiðnum við einari dagførdari FAS-skipan upp.

- Bólkurin fer at verða kveikjari fyri eini føroyskari shipping-vinnu, bæði á sjógvi og landi. Umframt at henda vinna við tíðini kann gerast eitt gott ískoyti til føroyska samfelagsbúskapin, skal bólkurin eisini viðvirka til, at shipping-vinnan gerst ein áhugaverd og attraktiv vinnugrein.

Hann segði, at maritimi fylgibólkurin eisini vil virka sum eitt bindilið millum almennar myndugleikar og shipping-vinnuna.

- Vit ætla at røkka hesum máli við, at fylgibólkurin regluliga kemur saman og viðger evni, sum viðvíkja vinnuni. Ætlan okkara er eisini at útvega útlendskan serkunnleika at umrøða ávís evni, soleiðis at føroyska vinnan áhaldandi fær íblástur frá altjóða shipping-vinnuni.

Ragnar S. Olsen segði, at fyrireikararnir eisini hava sett sær nøkur ítøkilig mál.

- Miðjað verður eftir, at Føroyar í 2015 hava eina shipping-vinnu við eini valutainntjening til føroyska samfelagið, ið svarar til eina miljard krónur í dagsins peningi. Eisini verður miðjað eftir, at 500 skip tá verða við í FAS-skipanini, segði hann vegna fyrireikararnar.